tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.02.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, ~~Eyð Jóna Eidesgaard~~, Arnfinn Bech

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Eyð Eidesgaard

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 12/25 | 25/00040-2 | Tvøroyrar Hornorkestur -fyriskipan av musikkstevnu Dýrabiðidag 2025 |
| 13/25 | 25/00065-3 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2025 |
| 14/25 | 24/00026-2 | GIGNI -kunning um heilsufrøðingin í Tvøroyrar skúla |
| **Til kunningar** | | |
| 4/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboðað, at hon berst frá at møta til býráðsfundin í dag 27. februar 2025, og hevur hon heitt á Jens Arna Leo Hammerfoss, ið er fyrst valdi tiltakslimur á lista C, javnaðarflokkurin til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg. Jens Arni Leo Hammerfoss hevur ikki havt sæti í býráðnum hetta valskeiði, og verður heitt á býráðið um at atkvøða, hvørt Jens Arni Leo Hammerfoss kann taka sæti í býráðnum til fundin í dag 27. februar 2025.
**Einmælt samtykt at Jens Arni Leo Hammerfoss tekur sæti til býráðsfundin 27. feb. 2025.**

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna –

**Viðmerkingar:**

- Arnfinn Bech hevur eina viðmerking um, og spyr hví kommunustýrisskipanin og fundarskipanin ikki eru á skrá.
- Kristin Michelsen, borgarstjóri upplýsir, at hesi bæði málini enn ikki eru liðugt viðgjørd og koma á skrá til ein seinni býráðsfund.
- Arnfinn Bech upplýsir, at hann metur seg verða ógegnigan at viðgerða mál 12/25 "Tvøroyrar Hornorkestur -fyriskipan av musikkstevnu Dýrabiðidag 2025"

**Til støðutakan**

## 12/25
## 25/00040-2 Tvøroyrar Hornorkestur -fyriskipan av musikkstevnu Dýrabiðidag 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 5/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 9/25 |
| 3 Býráðið | 27.02.2025 | 12/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.01.2025**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá Tvøroyrar Hornorkestur um at musikkstevna verður á Tvøroyri dýrabiðidag 16.mai. 2025, og tørvar Tvøroyrar Hornorkestur, *sum er fyriskipari av stevnuni*, at hoyra Tvøroyrar kommunu, um møguleikan fyri at fáa atgongd til hølir og hjálp til ymisk viðurskiftir kring stevnuna.

Hornorkestrið spyr um m.a. um møguleikið er fyri at lána teltið, sum Tvøroyrar kommuna eigur, sum ætlanin er at seta upp á Drelnes.

*"Ynskiligt er at hava tiltakið í SALT, men har hava vit nakrir logistiskir høklar. Tí hevur talan veri um, um tað ber til at lána teltið hjá kommununi, men tá má man hava ein back-up plan fyri, um veðrið verður ringt"*

Kommunustjórin hevur heitt á nevndina í Tvøroyrar Hornorkestur um at møta á fundinum hjá mentnarnevndini 10. feb. 2025, at greiða nærri frá musikkstevnuni.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:</u>**
Umboð fyri Hornorkestrið, Emilia Petersen, Barbara Gram og Noomi Michelsen møtti til fundin, at greiða frá Musikkstevnu, ið verður Dýrabiðidag, fríggjadagin 16. mai. Mett verður at uml. 250 luttakarar møta til stevnuna, sum verður í tíðarskeiðinum millum kl. 13.30 til kl. 18.00, við eftirfylgjandi veitslu fyri øllum luttakarum. Hornorkestrið spyr um tað ber til at fáa uppsett teltið hjá kommununi á Drelnes við borðum og stólum. Eisini verður søkt um TVK kann lata print til skránna og til sangir. Umboðini fyri hornorkestrið leggja upp til, at forkv. í Mentanarnevndini setur stevnuna. Avtala bleiv at hava uppfylgjandi fund til næsta fundin í Mentanarnevndini 7. Apríl kl. 13.00.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, at arbeiða víðari við ætlanini, tó verður nýggja teltið hjá kommununi ikki útleiga.

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað og býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**13/25**
**25/00065-3 TB-Fótboltur umsókn um stuðul til kappingarárið 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 15/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 16/25 |
| 3 Býráðið | 27.02.2025 | 13/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 07.02.2024**
André Dalfoss, form. í Tvøroyrar Bóltfelag TB, hevur umvegis teldupost sent umsitingini umsókn um peningarstuðul til fóltbóltsárið 2025.

Form. skrivar í umsóknini m.a:

> *Við hesum skrivi vil Tvøroyrar Bóltfelag (TB) søkja um fíggjarligan stuðul til fótbóltsárið 2025. Enn eitt ár er farið aftur um, og okur vilja við hesum takka Tvøroyrar Kommunu fyri tann stuðulin, ið hevur havt avgerandi týdning fyri felagið. Við miðvísum arbeiði hava okur megnað at lyfta okkum aftur í bestu deildina, Betrideildina, sum hevur verið eitt týðandi mál fyri felagið.*
>
> *Við fíggjarligum stuðli frá Tvøroyrar Kommunu í 2025 vilja okur leggja dent á hesi øki: 1. Styrkja okkara hóp við at bjóða bestu møguligu venjingarumstøður. 2. Menna ungdómsarbeiðið, soleiðis at okur framhaldandi kunnu ala upp lokal talent. 3. Viðlíkahalda og menna útgerð og hølir við Stórá, til gagns fyri bæði vaksin og børn. 4. Tryggja góðan rakstur av felagnum, serliga nú okur spæla í Betrideildini, ið krevur størri fíggjarligt rásarúm.*

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025 §524, Stuðul til ítrótt er avsett kr. 1.3 mió.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:</u>**
André Dalfoss møtti til fundin at greiða frá umsóknini um stuðul og yvirorðnað um ætlanir fyri kappingaráðið 2025.
Forkv. í mentanarnevndini mælir til, at lata í fíggjarligum stuðli kr. 600.000,-, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði *(kr. 90.000,-)*, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum á kr. 127.500,- (apr., juni, aug., okt.) Bjarni Hammer tekur undir við tilmælinum hjá forkv. Anita Vibergsdóttir mælir til at lata kr. 500.000,- í stuðul, har 15% verður latið til ungdómsarbeiði.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:</u>**
Bjarni Hammer mælir til at lata TB í fíggjarligum stuðli kr. 600.000,-, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði (kr. 90.000,-), har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum á kr. 127.500,-
Kristin Michelsen og Alvi Mortensen taka støði á býráðsfundinum.

**Býráðið 27. februar 2025:**
Kristin Michelsen og Anita Vibergsdóttir mæla til at fylgja minniluta tilmælinum hjá mentanarnevndini og lata kr. 500.000,- í stuðul, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

Bjarni Hammer og Barbara Tausen mæla til at fylgja meiriluta tilmælið hjá mentanarnevndini, at lata kr. 600.000,- í stuðul, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

Arnfinn Bech mælir til at lata stuðul á kr. 800.000,-, við viðmerking um at felagið fremur týðandi ungdómsarbeiði, í stuðul, har 25% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

**Til støðutakan eru sostatt trý uppskot til støðutakan:**

1. Atkvøtt verður um tilmælið hjá Arnfinn Bech og lata kr. 800.000,- í stuðul. har 25% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði, har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

**Fyri eru**: Arnfinn Bech
**Ímóti eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Tausen, Jens Arni Leo Hammerfoss og Bjarni Hammer
**Uppskotið er fallið**

2. Atkvøtt verður um minniluta tilmælið hjá mentanarnevndini og lata kr. 500.00,- í stuðul, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen
**Ímóti eru:** Barbara Tausen, Jens Arni Leo Hammerfoss, Bjarni Hammer, Arnfinn Bech
**Uppskotið er fallið**

3. Atkvøtt verður um meiriluta tilmælið hjá mentanarnevndini og lata kr. 600.00,- í stuðul, har 15% verður oyramerkt til ungdómsarbeiði har 1/2 verður útgoldin beinanvegin og restin í 4 ratum apr., juni, aug. og okt.

**Fyri eru:** Barbara Tausen, Jens Arni Leo Hammerfoss, Bjarni Hammer, Arnfinn Bech
**Ímóti eru:** Kristin Michelsen og Anita Vibergsdóttir
**Blankt:** Alvi Mortensen
**Uppskotið er samtykt**

Kristin Michelsen ynskir viðmerkt, at form. í TB hevur fráboða, at stuðul á kr. 500.000,- er nøktandi.

**14/25**
**24/00026-2 GIGNI -kunning um heilsufrøðingin í Tvøroyrar skúla**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 5 Býráðið | 27.02.2025 | 14/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.01.2024**
Umsitingin hevur hin 19. Jan., móttikið kunning frá GIGNI, um at vitkandi heilsufrøðingurin í skúlanum gevst tann 1. Feb2024. Sagt verður frá at, heilsufrøðingurin hevur valt at fara í annað starv. Hetta, tí hon arbeiðir við at fáa sær royndir, sum krevjast fyri at kunna útbúgva seg til heilsufrøðing, og hetta gleðast vit um.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 15. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Sosiala nevnd 12. september 2024:**
Heitt verður á umsitingina um at venda seg til GIGNI fyri at fáa eina støðulýsing av heilsufrøðinginum í Tvøroyrar skúla.

**Kommunustjórin 22.02.2025:**
Umsitingin hevur hin 18. feb. 2025 móttikið teldupost frá Gigna:

> *«Trupult er at manna starvið sum skúlaheilsufrøðingur í Suðri. Í løtuni hava vit ein sjúkrarøktarfrøðing uppá dispensatión, sum kemur suður áleið 24 tímar um mánaðin.*
>
> *Vit hava gjørt avtalu við eina danskan heilsufrøðing, sum kemur til Suðuroyar at arbeiða í 3 vikur frá síðst í apríl mánaða.*

*Gigni upplýsir at heimild ikki er at gjalda bústað til hennara meðan hon er her, og hon kemur ikki, um hon skal gjalda fyri bústaðin sjálv. Hava tit møguleika fyri at skaffa henni tak yvir høvdið hesar tríggjar vikurnar hon er her? Talan er um 27. apríl til og við 16 mai.»*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018, §11. Landið ber allar útreiðslur sambært hesi lóg. Stk. 2. Kommunurnar bera útreiðslurnar til viðtaluhøli hjá kommunulæknum og heilsufrøðingum.

**Tilmælið:**
Mælt verður býráðnum til at taka avgerð um, hvørt Tvøroyrar kommuna kann halda útreiðslur til bústað hjá skúlaheilsufrøðingi, samsv. fyrisp./áheitan hjá Gigni dagf. 18. feb. 2025.

**Býráðið 27. februar 2025:**
Kristin Michelsen mælir til at ganga umsóknini á møti hesa eini ferðina, men at útreiðslurnar verða býttar eftir fólkatalinum í hvørja kommunu sær í Suðuroynni.
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Barbara Tausen, Alvi Mortensen, Jens Arni Leo Hammerfoss, Bjarni Hammer
**Ímóti eru:** Arnfinn Bech
**Uppskotið er samtykt**

Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at talan er um eina landsuppgávu at loysa og eru reglur á hesum økinum.

**Til kunningar**

## 4/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Jens Arni Leo Hammerfoss

Arnfinn Bech